# Klaksvíkingar skriva og tekna

**Steintór Rasmussen og Óli Petersen standa fyri framhaldssøguni í Sosialinum í desember mánaði**

Steintór og Óli hoyra til hvør sítt ættarlið av skapandi fólki í Klaksvík.

Óli Petersen er tann eldri teknarin, meðan Steintór er tann yngri yrkjarin.

Nú hava teir funnið saman í eitt nýtt samstarv í sambandi við jólamánaðin í Sosialinum. Steintór skrivar søguna um Trølla Pætur og Ommuna, og Óli P. ger tekningarnar til søguna, sum verður at lesa í Sosialinum í desember.

Óli Petersen, sum var føddur í Klaksvík í 1936, hevur gjørt tekningar til alskyns útgávur – alt frá bløðum til bøkur og meira enn tað. Seinastu 17 árini hevur Óli verið fastur baksíðuteknari á Sosialinum, og ikki minst hesi árini er Óli blivin fólkaogn í Føroyum. Hansara beinraknu tekningar venda alt á høvdið og fáa fólk at flenna ella hugsa.

Áðrenn allir føroyingar komu at kenna Óla P, vistu klaksvíkingar um hann, tí Óli var við til at gera tiltiknu skemtirøðina Rukkulakkan.

Steintór Rasmussen er best kendur frá bólkinum Frændum, sum man vera best umtókti føroyski tónleikabólkurin nakrantíð. Steintór hevur skrivað nógvar av best dámdui sangunum hjá bólkinum, og hann hevur bæði gjørt yrkingar og løg.

Seinnu árini hevur Steintór eisini skrivað nógvar barnasangir til útgávurnar við Kulum Rótum, og herfyri fekk Steintór Barnabókavirðislønina hjá Tórshavnar kommunu fyri teir mongu populeru barnasangirnar.






















